

## Lærarastørv í Viðareiðis Skúla

Tíðaravmarkað størv skúlaárið 2006/2007 í Viðareiðis Skúla verða lýst leys til setan frá 1. august 2006

***Søkt verður eftir:***
· einum lærara til fulltíðarstarv
· einum lærara til avlopstímar. Starvið er umleið 14 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður fastsett í september.

***Tey, ið sett verða skulu:***
· undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
· duga at samstarva
· verða fús at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
· verða við til áhaldandi at menna skúlan

***Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kunnu átaka sær:***
· flokslærarauppgávu
· undirvísa í føroyskum, donskum og enskum
· undirvísa í handaligu lærugreinunum
· undirvísa í ítrótti
· undirvísa í kristni
· serligan tørv
· kt

***Førleikakrøv***
Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

***Løn***
Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

***Umsóknir***
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 2. juni kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Jensebeth Absalonsen, skúlaleiðara á tlf. 45 11 80 ella 58 80 52.

**Viðareiðis Skúli**
Fo – 750 Viðareiði
Tlf. 451180 – 588052
Teldupostur: vid@skulin.fo

*Viðareiðis skúli hevur komandi skúlaár 48 næmingar frá 1. – 7. flokk í fýra flokkum og 6 lærarar.*

*Viðareiðis skúli er ein nútímans skúli við góðum umstøðum bæði fyri næmingar og lærarar.*

# Lærarastørv í Skúlanum á Velbastað

**– skúlin er í Miðheiminum. Bert 10 min. úr Havn heim til Velbastaðar!**

Søkt verður eftir einum lærara til tíðaravmarkað starv og einum lærara til avlopstímar skúlaárið 2006/2007. Endaliga tímatalið verður ásett 1. september.

**Tey, ið sett verða skulu:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- vera fús at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving. Læraralesandi, sum lúka prógv í summar, kunnu eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.m. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi **í seinasta lagi týsdagin 6. juni kl. 16.00.**

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Manbjørn Mortensen, skúlaleiðara á tlf. 302505 ella 228607.

Skúlin á Velbastað er ein 4 flokkaður skúli við undirvísing í 1.-7. árgang. Komandi skúlaár verða 5 lærarar og 49 næmingar í skúlanum.

TVØROYRAR KOMMUNA

# Lærarastørv í Tvøroyrar skúla

**Hesi størv eru leys at søkja:**
- 3-4 tíðaravmarkað fulltíðarstørv skúlaárið 2006-07 vegna lærarar í farloyvi og lækkað tímatal.
- 1 tíðaravmarkað parttíðarstarv skúlaárið 2006-07 vegna avlopstímar og serligan tørv.

**Lærarar, ið settir verða skulu:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við starvsfelagarnar fremja frálæru og verða partur av skúlans dagliga arbeiði
- duga at samstarva og vera fyrikomandi
- vera fúsir til at átaka sær uppgávur, ið annars eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Harafturat skulu lærararnir hava førleika til at átaka sær allar vanligar lærugreinir, og umframt tað hevur skúlin tørv á lærarum, ið skulu átaka sær:**
- frálæru í týskum
- frálæru í ítrótti og svimjing
- frálæru í alis- og evnafrøði
- flokslærarauppgávu

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða sett sum tíðaravmarkaði sáttmálasett størv.

Tímatalið til parttíðarstarvið verður ikki endaliga ásett fyrr enn í september 2006.

Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar størvunum viðvíkjandi og koma at starvast við báðar skúlarnar í kommununi: Tvøroyrar skúla og Trongisvágs skúla.

Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1-27.4 sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir:**
Umsóknir við c. v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi ónsdagin 7. juni 2006 kl. 16.00.**

Meiri fæst at vita um størvini hjá skúlastjóranum:

**Martin Eidesgaard**
Tlf. 371582
FO-800 Tvøroyri

Tvøroyrar/Trongisvágs skúli er 10 flokkaður skúli við 2 flokkum í næstan øllum árgangum, og í skúlaárinum 2006/07 eru 27 fulltíðarstørv í skúlanum umframt 1 parttíðarstarv, og har ganga 293 næmingar.



## Leyst starv

**Arbeiðsmaður til umsitingina**

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir arbeiðsmanni til umsitingina í Ráðhúsinum.

Umsóknarfreist: Mánadagin 5. juni 2006.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært fastlønarsáttmálanum millum Havnar Arbeiðsmannafelag og Havnar Arbeiðsgevarafelag. Fyri at flaggað verða 1000 kr. latin í viðbót. Nakað av arbeiði er uttanfyri vanliga arbeiðstíð, sum verður avspáka.

Meira fæst at vita við at venda sær til Eivind Danielsen, leiðara á húsaumsitingini ella Bjørgfríð Ludvig, miðfyrisitingarstjóra, tlf. 302010.

**Les meira um starvið á www.torshavn.fo/leysstorv**

www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

**Tórshavnar kommuna**


# Eysturoyingar!

Teoriskeið til **motorsúkklu** byrjar í Eysturoynni leygardagin 27. mai kl. 16.00

SINSERO 351800

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**Stanley A. Olsen**
koyrilærari
**tel 21 10 99**

**John A. Christiansen**
koyrilærari
**tel 21 47 75**

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**





